

## Cafu kann seta met

Tá Brasilia fór á vøllin til HM-finaluna móti Týsklandi fyri fýra árum síðani, gjørdist Cafu fyrsti spælarin, sum hevur tikið lut í trimum HM-finalum. Offensivi høgri bakkurin hevur tó enn »bara« vunnið tvey HM-gull, og tað er eitt færri enn Pelé, sum vann í ’58, ’62 og ’70. Í 1962 var hann tó ikki partur av finaluni. Vinnur Brasil aftur HM hesaferð, fær Cafu soleiðis sítt triða gullmerki, umframt at hann eisini verður einasti spælarin, sum røkkur eini fjórðu HM-finalu.

**-mørk**

## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

***Hvør fer víðari úr bólki H***

| | |
|---|---|
| Spania & Ukraina | 1,45 |
| Spania & Tunis | 2,85 |
| Spania & Saudi Arabia | 8,00 |
| Ukraina & Tunis | 8,00 |
| Urkaina & Saudi Arabia | 35,00 |
| Tunis & Saudi Arabia | 70,00 |

## Bólkur H

### SAUDI ARABIA

**Málverjar**
Mohammed Al Dayeya
Mabrouk Zaid
Mohammad Khojah

**Verja**
Ahmed Dokhi
Redha Tukar
Hamad Al Montashari
Naif Al Quadi
Mohammed Noor
Hussein Sulimani
Ahmed Al Bahri

**Miðvøllur**
Omar Al Ghamdi
Mohammed Ameen
Mohammad Al Shihoub
Abdulaziz Khathran
Saud Hjariri
Khaled Aziz
Nawaf Al temyat

**Álop**
Sami Al Jaber
Saad Al Harthi
Mohammed Al Anbar
Yasser Al Kahtani
Malek Mouath

### SPANIA

**Málverjar**
Iker Casillas
Santiago Canizares
Jose Reina

**Verja**
Michel Salgado
Mariano Pernia
Carlos Marchena
Carles Puyol
Guerrero Antonio Lopez
Garcia Sergio Ramos
Gutierrez Juanito
Ibanez Pablo

**Miðvøllur**
David Albelda
Hernandez Xavi
Sanz Luis Garcia
Andres Iniesta
Xabi Alonso
Marcos Senna
Sanchez Joaquin
Francesc Fabregas

**Álop**
Gonzalez Raul
Fernando Torres
Jose Antonio Reyes
David Villa

### TUNIS

**Málverjar**
Ali Boumnijel
Adel Nefzi
Hamdi Kasraoul

**Verja**
Karim Haggui
Alaeddine Yahia
Hatem Trabelsi
Mahdi Meriah
Riadh Bouazizi
Radhi Jaidi
David Jemmal
Karim Saidi

**Miðvøllur**
Mehdi Nafti
Kales Ghodhbane
Jaouhar Mnari
Adel Chedli
Anis Ayari
Hamed Namouchi
Sofiane Melliti

**Álop**
Chouki Ben Saada
Karim Essediri
Zied Jaziri
Yacine Chikhaoui
Francileudo Santos

### UKRAINA

**Málverjar**
Olaxandr Shovkovskly
Andrei Pyatov
Bohdan Shust

**Verja**
Andriy Nesmachnly
Olexandr Yatsenko
Volodymyr Yezerskly
Andriy Rusol
Dmytro Chigrynskiy
Vladislav Vashchuk
Viacheslav Sviderskly

**Miðvøllur**
Anatolly Tymoschuk
Oleg Shelayev
Andriy Gusin
Serhiy Nazarenko
Maxim Kalinichenko
Ruslan Rotan

**Álop**
Andriy Shevchenko
Oleg Gusev
Andriy Voronin
Serhiy Rebrov
Artem Milevskiy
Andriy Vorobey
Oleksiy Byelik

# Gylt sponsk lyfti

**Hóast teir mest sum altíð tykjast kiksa, tá mest stendur á, so er langt síðani, at Spania hevur hvat ein somikið lovandi hóp, sum teir hava tað hesaferð**

HM BÓLKUR H

*Jákup Mørk” jakup@ sosialurin.fo*

Hóast Spaniólar ígjøgnum áratíggju hava havt nøkur av sterkastu feløgunum í heiminum, og hóast teir ferð eftir ferð eru farnir til HM sum partur av favoritt-feltinum, so er sjaldan meira enn bara tos komið burturúr. Afturi í 1964 vunnu teir EM-heitið, og 20 ár seinni gjørdist talan um EM-silvur. Men í HM-høpi er søgan nærum syrgilig. Eitt fjórðapláss í 1950 – har talan var um finaluumfar – og annars fjórðingsfinaluar í ’86, ’94 og ’02 er tað, sum er komið burturúr, og tað er nakað nógv minni, enn bæði áskoðarar og spælarar hava havt vónir um.

### Klassi um alt liðið

Spanska liðið hesa ferð tykist snøgt sagt vera ov sterkt, til at teir enn einaferð skulu vísa seg sum vónbrotið í kappingini. Cassillas, Salgado, Puyol, Luis Garcia, Joaquin, Fabregas, Raul, Torres, Reyes og Villa eru alt spælarar, sum treingjast upp móti avgjørda heimsoddinum. Teir spæla við nøkrum av sterkastu feløgunum í heiminum, og kenna tí alt til trýstið, sum hvílur á stórum spælarum í stórum dystum.

Ikki minst verður tað sera spennandi at fylgja teimum báðum, Torres og Fabregas. Torres kom á landsliðið fyri tveimum árum síðani, og higartil er talan blivin til 30 dystir og 10 mál. Hóast hann higartil hevur verið trúfastur móti Atletico Madrid, so tykist tað bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn okkurt pengasterkari felag – helst í Onglandi – fer avstað við undirskrift hansara, og einki er at ivast í, at eisini hetta er ein eyka motivatiónsfaktorur hjá spælaranum komandi mánaðin.

Cesc Fabregas gjørdist í ár yngsti spanski landsliðsspælarin í søguni, og hóast unga aldurin hevur hann longu nú bitið seg rimmarfastan á sterka Arsenal-miðvøllin. Megnar hann at gera eins nógv um seg á spanska miðvøllinum í summar, kann hann heilt avgjørt gerast næsta stóra superstjørnan hjá Spania, og tá skal sjálvt ikki Raul kenna seg tryggan á trúnuni.

Júst royndir spælarar sum eitt nú Raul tykjast eisini vera garanturin fyri, at Spania hesa ferð kann gera meira um seg, enn vanligt hevur verið. Tá ungu stjørnuskotini hava royndar kreftir at stuðla seg at, kann hetta lyfta nakað av trýstinum, og tí eru allar fortreytir til staðar fyri einum góðum sponskum HM.

### Svangir outsidarar

Saman við Ukraina er tí einki at ivast í, at Spania eru stórfavorittar at vinna seg víðari úr bólkaspæliknum, men bæði Saudi Arabia og Tunis eru tó vandamikil mótstøðulið.

Ikki minst hevur Tunis gjøgnum skjótt fleiri ár sýnt seg sum eitt óvanliga væl skipað afrikanskt lið, og við Roger Lemerre sum venjara verður hetta helst eisini ein av fremstu dygdunum hesaferð. Úrtøkan tær báðar seinastu ferðirnar hevur tó verið sera soltin við bara einum stigi í bæði ’98 og ’02, og tí er einki at ivast í, at spælararnir eru seras uppsettir, nú teir triðu ferð á rað eru partur av HM.

Hjá Saudi Arabia er talan um fjórðu undankappingina á rað, men eisini hjá teimum hevur úrtøkan verið soltin seinastu ferðirnar. Í USA eydnaðist tó at koma víðari úr bólkaspælinum, men síðani hevur talan bara verið um ein einastakan javnleik, og tað er ikki nøktandi.

Ríka fótbóltssambandið tykist eisini hava stórar ambitiónir, og skiftini á landsliðsvenjarasessinum hava eisini verið títt. Og um brasilski Marcos Paquetá kann broyta nakað í so máta tykist ógvuliga óvíst.



*Fernando Torres og Cesc Fabregas teljast báðir millum mest spennandi ungu nøvnini í HM-endaspælinum. Kunnu teir liva upp til vónirnar hjá áskoðarunum, er Spania uttan iva heilt væl ávegis eini endastøðu millum tey allarfremstu*

*Mynd: Scanpix*